

*Framvegis er eingin semja um seming. Hóast báðir partar ynskja broytingar á økinum, megna partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki at koma til eina felagsloysn.*
*Mynd: Savnsmynd*

# Ongin semja um seming

**Øll ynskja eina dagføring av lógini, ið loysir trætur á arbeiðsmarknaðinum. Kortini kunnu partarnar ikki semjast um, hvussu nýggja lógin skal síggja út. Stóri spurningurin er um tað ikki er neyðugt við eini hugburðsbroyting hjá báðum pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, um dagføringin skal gerast veruleiki**

SAMANUMTIKIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað tykist nærum ógjørligt at finna eina semju um seming á arbeiðsmarknaðartrætum millum fakfeløgini á aðrari síðuni og politiska myndugleikan og arbeiðsgevaran á hinari síðuni.

Hóast báðir partar ynskja broytingar á økinum, megna partarnir ikki at koma til eina felagsloysn, so tann alt avgerandi semjan millum fakfeløgini og arbeiðsgevararnir kann fáast undir land.

Júst semjan millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum um loysn á trætum á arbeiðsmarknaðinum tykist vera einasti møguleikin fyri, at vit fáa ein dagførdan føroyskan arbeiðsmarknað, sum er fult á hædd við aðrar arbeiðsmarknaðir.

Politiski myndugleikin í Føroyum hevur fleiri ferðir roynt at fingið partarnar at semjast um eitt nýtt uppskot, men tað kann tykjast sum, at báðir partar hava valt at grava seg niður í skotgrøvurnar, og geva hinum partinum skuldina av, at eingin semja finnist.

Fleiri bólkar og nevndir - umboðað av báðum pørtum á arbeiðsmarknaðinum hava arbeitt við at snikka eitt uppskot til, men summa sumarum er, at eingin semja er funnin, tí hvørgin partur vil geva seg.

Henda støðan hevði so við sær, at landsstýrismaðurin í vinnumálum sjálvur gjørdi eitt uppskot til hoyringar hjá pørtunum um seming á arbeiðsmarknaðartrætum, men heldur ikki hetta uppskotið kunnu partarnir semjast.

Stóra stríðsmálið hesuferð hevur verið, hvørt landsstýrismaðurin kann loyva sær at lóggeva á økinum, uttan at fakfeløgini eru samd um uppskotið. Hetta stríðsmál hevur nú eisini sett kílar í samgonguarbeiðið, og sum støðan er í løtuni, er tað bara Fólkaflokkurin, ið tekur undir við uppskotinum hjá Bjarna Djurholm.

Samanumtikið siga allir partar til dagføring á økinum, men at taka undir við eini semju, allir partar kunnu taka undir, verður heldur torførari. Skal hesin stóri knútur loysast, so krevst, at partarnir koma úr skotgrøvunum og byrja at lurta og lora á summum økjum, so tann avgerandi semjan kann finnast.

## Tvíhalda um sítt

Tá tosað verður um trætur á arbeiðsmarknaðinum, verður skilt millum tvey sløg av trætum. Býtt verður ímillum áhugamálstrætur og rættartrætur. Áhugamálstrætur fevna vanliga um tulkingar av sáttmálum, um hvørjar reglur skulu vera galdandi á nýggjum arbeiðsøkjum og annað. Rættartrætur snúgva seg um beinleiðis sáttmálabrot. Til áhugamálstrætur hevur gerðarrættur verið mest nýtta amboðið, meðan rættartræturnar verða loystar í einum arbeiðsrætti ella dómstóli. Í Føroyum hava vit havt gerðarrætt til at loysa áhugamálstrætur, og fútarætturin til at loysa sáttmálatræturnar.

Nýggja uppskotið hjá Bjarna Djurholm leggur upp til, at ein stovnur, sum verður kallaður fasti gerðarrætturin, bæði skal taka sær av áhugamálstrætum og sáttmálabroti. Ein kann tí kalla nýggja stovnin eina samanrenning av arbeiðsrætti og gerðarrætti.

Ein av grundgevingunum hjá landsstýrismanninum fyri uppskotinum hevur verið, at tað ber ikki, at vit í Føroyum framvegis hava so óskipað viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, tí sammett við okkara grannalond, eru vit eftirdyggiliga eftirbátar, tá tað kemur til eitt rættarkerv til loysa trætur og stríðsmál á arbeiðsmarknaðinum

Føroysku fakfeløgini við Føroya Arbeiðarafelag og Starvsmannafelagnum á odda hava gjørt Bjarna Djurholm greitt, at tey vilja ikki síggja nakað til ein fastan gerðarrættin, tí stovnurin skerjir teirra rættindi. Tey eru eisini bangin um, at ein fastur gerðarrættur vil hjálpa áhugamálunum hjá arbeiðsgevarunum og harvið arbeiða ímóti fakfeløgunum.

Grundgevingin hjá arbeiðsgevarunum hevur hinvegin verið, at ein arbeiðsrættur tekur skjótar og greiðar avgerðir, og tí slepst undan longri ósemjum, sum vanliga eru sera kostnaðarmiklar fyri samfelagið. Grundgevingarnar fyri og ímóti eru ikki nógv broyttar seinastu árini, og og tað er bert ein staðfesting av, at hvørgin parturin vil boyggja seg.

Úrslitið verður tí tað, sum eingin ynskir, at hildið verður fast við gomlu lógina, sum allir partar ynskja eina dagføring av.

Spurningurin er so, hvussu ein so kemur víðari frá gomlu ósemjuni, sum báðir partar vita ikki førir til nakað úrslit. Hóast Bjarni Djurholm sigur seg ætla at arbeiða víðari við málinum, sjálvt um hann fær dygga mótstøðu, so er væntandi, at hann verður noyddur at byrja av nýggjum.

## Stór ábyrgd

Í samrøðu við Sosialin segði ein løgfrøðingur hjá LO, at hann fekk seg ikki til at trúgva, at politikkarnir í Føroyum kundu trýsta nakað yvir høvdið á pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, har tann eini parturin ikki vildi góðtaka uppskotið, tí hugskotið aftanfyri sjálvan arbeiðsmarknaðin er júst bygt á semju.

Einasta loysn í løtuni tykist verða, at landsstýrismaðurin tekur uppskotið aftur, og gevur pørtunum á arbeiðsmarknaðinum ein síðsta møguleika at finna til semju. Verður tað gongdin í málinum, hvílir ein ómetalig stór ábyrgd á herðunum hjá báðum pørtum.

Fakfeløgini trúgva framvegis, at tað ber til at finna eina semju, men arbeiðsgevararnir eru meira dapurskygdir. Teir seta seg kortini ikki ímóti, at gera enn eina roynd at finna eina loysn saman við fakfeløgunum, hóast teir helst ynskja eina lóggeving á økinum.

Men tað krevur eina hugburðsbroyting hjá báðum pørtum at finna eina loysn, tí verður farið undir at finna semju við gamla agginum í skjáttuni, endar aftur úrslitaleyst.

Á hvørjum økjum partarnir verða noyddir at lora fyri at finna eina felagssemju er ilt at siga, men hugsast kann, at serliga verður verkfalsrætturin stóra stríðsmálið, tí skal hann gevast upp, so skulu arbeiðarafeløgini hava nakað afturfyri, og spurningur er um tað yvirhøvur fer at lata seg gera.



# Annita verður landsstýriskvinna

**Tjóðveldisflokkurin fer at útneva Annitu á Fríðriksmørk til landsstýriskvinnu við mentamálum, siga álítandi keldur í Tjóðveldisflokkinum. Høgni Hoydal, formaður í flokkinum, vil kortini ikki vátta tíðindini og vil vera við, at endaliga avgerðin ikki er tikin**

ÚTNEVNING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Annita á Fríðriksmørk skal vera landsstýriskvinna, hevur tingmanningin hjá Tjóðveldisflokkinum gjørt av*

So skuldi tað verið púra vist. Annita á Fríðriksmørk verður nýggj landsstýriskvinna við mentamálum fyri Tjóðveldisflokkin. Tað tók tingmanningin hjá Tjóðveldisflokkinum avgerð um á fundi týskvøldi.

Sambært upplýsingum hjá Sosialinum hevði Høgni Hoydal floksformaður, trý uppskot til nýggjan landsstýrismann at leggja fyri tingmanningina. Tey vóru Annita á Fríðriksmørk, Hergeir Nielsen og Jógvan Durhuus. Hesi vóru vald út av einum lista við níggju uppskotum. Formaður mælti sjálvur tingbólkinum til at velja Annitu á Fríðriksmørk á fundinum.

Tingmanningin tók avgerðina uttan atkvøðugreiðslu, men greiður meiriluti er fyri Annitu. Avgerðin verður neyvan kunngjørd fyrr enn í næstu viku skilst, men broytist avgerðin er talan um reint myttarí móti formanninum og floksleiðsluni.

Høgni Hoydal vildi kortini ikki vátta tíðindini, tá vit spurdu hann á døgurða týsdagin.

– Eg hevði ikki torað at skriva tað, hevði eg verið tú, tí avgerðin er ikki tikin enn. Eingin endalig avgerð er tikin, so eg kann hvørki vátta ella avsanna tað, tú sigur. Tingbólkurin skuldi fyrsta avkláráð nøkur ting, og fyrr enn tað er gjørt, er eingin avgerðin tikin, sigur Høgni Hoydal.

## Triðja kvinnan

Høvuðspersónin sjálvan, Annitu á Fríðriksmørk, fingu vit ikki fatur á, áðrenn blaðið fór til prentingar. Annita á Fríðriksmørk er lærari og umboðar Tjóðveldisflokkin í løgtinginum, har hon eitt nú er forkvinna í mentanarnevndini.

Annita Fríðriksmørk er triðja kvinnan, sum kemur í landsstýrið fyri Tjóðveldisflokkin. Áður hava Jóngerð Purkhús og Annlis Bjarkhamar umboðað flokkin í landsstýrinum.

Afturat teimum hava bara tríggjar kvinnur sitið í landsstýrinum. Marita Petersen, sum eisini var løgmaður, hevur umboðað Javnaðarflokkin, Helena Dam á Neystabø sat fyri Sjálvstýrisflokkin og Karolina Petersen var landsstýriskvinna fyri Framsóknarflokkin.

## Ringt tannabit

Tað var kortini ikki bara við góðum tannabiti, at tingmanningin í Suðurstreymoy tók undir við at seta Annitu á Fríðriksmørk í starv. Tað kemst av politiska spælinum, sum altíð er við slík høvi.

Valið av Annitu merkir nevniliga, at tann rebelski Finnur Helmsdal kemur aftur á ting. Eitt er, at hann kann gerast maðurin, sum forðar uppskotum at verða samtykt, tí meirilutin hjá samgonguni er so tapur. Eitt annað er, at dysturin um tingsessirnar í Suðurstreymoy er so harður, og tí viknar støðan hjá sitandi tingmonnum, um Finnur Helmsdal kemur á ting og fær spælt upp á sítt sosiala streingjaføri. Finnur Helmsdal er leiðari á Føroya Barnaheimi.

## BLÁBÓK

**Annita á Fríðriksmørk**

**Foreldur:** Simona og Henry Frederiksberg.
**Maður:** Páll Olsen sonur Brynhild og Eliesar Olsen
**Útbúgving:** Fólkaskúlalærari, útbúgvin 1992 á Føroya Læraraskúla.
**Yrki:** Lærari. August 1992 til juli 1994 í Stranda skúla. Januar 1995 til juli 1995 í Keypmannahavn. August 1995 til juli 1996 við Ósáskúlan í Klaksvík. Síðan august 1996 starvssett á Tekniska skúla í Havn.
Bygdarráðslimur í Sjóvar kommunu frá 1. januar 1997 til 1. mai 1998.
Løgtingsmaður síðan mai 1998. Formaður í mentanarnevndini og limur í eftirlit við varðhaldsfangum

*Kelda: www.logting.fo*

# Vagn vil røkja gravstaðir

**– Tað eru nógv vøkur gravstøð kring landið, men tað eru eisini nógv, sum als ikki verða hildin, sigur Vagn Jákupsson í Geil, sum nú bjóðar sær til at røkja gravstaðir fyri fólk**

GRAVSTAÐIR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað hevur verið vanligt í Føroyum, at fólk sjálvi røkja gravstaðirnir, sum hoyra til familjuna, men nú verður møguligt at fáa Vagn Jákupsson í Geil at gera hetta.

Hann tekur nú stig til eina nýggja tænastu, sum hann kallar Gravstaðarrøktin, og í stuttum kann sigast, at hann bjóðar sær til at halda gravstaðir fyri fólk.

– Eg havi hugsað um hetta í eina tíð, men eg havi ivast eitt sindur í, um eg skuldi fara undir hetta, tí gravstaðir er nakað sera persónligt, sigur hann.

– Men eg haldi, at tað er tørvur á hesi tænastu, tí hóast tað eru nógv vøkur gravstað kring landið, so eru tað eisini nógv, sum als ikki verða hildin.

*– Øll fólk hava kanska ikki stundir til at passa gravstaðirnar so væl, og tað finnast eisini føroyingar uttanlands, sum ikki hava møguleikan til tað, men nú kann eg gera tað fyri tey, sigur Vagn Jákupsson í Geil*

## Árlig tænasta

Vagn í Geil býr á Argjum, men hann hevur í fyrstu syftu ikki sett nakað mark fyri, hvussu langt hann fer at reika.

– Eg vænti, at tað verður nógv at gera, og um tørvurin er stóru í høvuðsstaðnum, so er tað er spurningur, hvussu nógv eg fái stundir til at fara aðrastaðni, sigur hann.

Vagn ætlar at bjóða fólki eina røkt av gravstaði, sum umfatar fýra vitjanir um árið. Hendan tænastan fer at koasta 1500 krónur.

Hann bjóðar eisini aðrar tænastur, sum at planta blómur til serligar tíðir, reinsa gravsteinar og annað.

– Øll fólk hava kanska ikki stundir til at passa gravstaðirnar so væl, og tað finnast eisini føroyingar uttanlands, sum ikki hava møguleikan til tað, men nú kann eg gera tað fyri tey.

